Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 31. mars 2006



**Soleiðis**
So gongur leiðin til Søllerød Kro, sum Jan Restorff rekur. Søllerød Kro varð í fjør kosin "Årets Spisested". Í hesum sambandi varð skipað fyri "Gourmetkvøldi" saman við 4 kokkum, sum hava fingið virðisløn. Gourmet - Soleiðis!

**Hósdag 6. kl. 20.30**



**3-2 - Vælkomin til fótbóltsárið, ið kemur!**
3-2 hevur hitað upp til kappingarárið í fótbólti í ymsu sendingunum, og nú verður sjunturin snaraður heilt í botn. Nú fyrsta umfar er farið afturum, bjóðar 3-2 hyggjarunum vælkomnum til eina upptaktssending um fótbóltin. Saman við gestum verður mett um møguleikarnar hjá hvørjum liði sær, hvør fer upp og hvør fer niður

**Mánadag 3. kl. 20.25**

**Dr-Derude í Noreg**
Fyri seks árum síðan vitjaðu Søren R. Petersen og DR-Derude Svalbard. Tá var Per teirra ferðaleiðari. Í sínum ungum døgum var hann ísbjarnaveiðumaður á Svalbard. Nú hevur Søren aftur vitjað Per, ið frá eini bygd nærhendis Trondheim. Og kynt verður dúgliga upp í ovnunum hjá Peri, júst sum hina ferðina fyri seks árum síðan.

**Sunnudag 2. kl. 18.00**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**